# Prednisolon

## Hvat er Prednisolon

Prednisolon er eitt tilevnað (syntetiskt) hjánýrabarkhormon, ið kann gevast í størri mongdum enn hjánýrabarkhormon, ið kroppurin sjálvur framleiðir. Prednisolon verður nýtt sum heilivágur til nógvar ymiskar sjúkur m.a. astma, gikta-, livra- og tarmbrunasjúkur ( colitis ulcerosa (sárlangabruni) og morbus Crohn).




## Hvussu virkar Prednisolon

Prednisolon tarnar bruna.

## Hvørji hjáárin hevur prednisolon

Prednisolon kann hava hjáárin. Ikki øll fáa hjáárin, men í øllum førum skulu hjáárin fyribyrgjast. Nøkur hjáárin kunnu setast í samband við mongdina av heilivági, meðan onnur ikki koma, fyrr enn sjúklingurin hevur verið í viðgerð í longri tíð. Sjúklingar kunnu fáa andvekur, óró, sjúkligt ovfarakæti (mani) ella tunglyndi (depressión). Onnur hjáárin eru: ov góður matarlystur, vatn í kroppinum,  broyting av fitibýtinum í kroppinum, viðkvæma ella ringa húð, økta háring, lyndi til ígerðarsjúkur (infektiónir) og versnan av møguligari sukursjúku.

Prednisolonviðgerð í longri tíð kann viðføra beinbroyskni (osteoporosu).

Av tí, at Prednisolon hevur so nógv hjáárin, verður prednisolon einans nýtt, tá ið onnur viðgerð við minni hjáárinum ikki kann nýtast. Prednisolon er tó ein sera effektivur heilivágur, ið hevur hjálpt nógvum sjúklingum við kroniskum sjúkum til at fáa tað betri.

**Gevi gætur, tá ið tú ert í viðgerð við Prednisolon:**
Prednisolon-heilivágurin  tarnar vanligu framleiðsluni av prednisoloni í kroppinum.  Verður viðgerð við Prednisoloni knappliga steðgað, kann tað viðføra akuttan mangul upp á hjánýrabarkhormon, og tað er lívshættisligt.

Tá ið Prednisolon skal takast í longri tíð, eigur sjúklingurin eisini at taka kálk saman við D-vitaminum, fyri at minka um vandan fyri beinbroyskni. Tað er eisini vanligt at gera eina beinskanning (DEXA-skanning), fyri at meta um kálkmongdina í beinagrindini.

Vinarliga
Gastroenterologiskt Ambulatorium G3

Landssjúkrahúsið
tel 304500, www.ls.fo